


**Nr. 5** **9. mars 2014** **74. árg.**

# Vel rætt

*Ríki mítt er ikki av hesum heimi. Jóh. 18,36.*

Nú eru vit komin inn í føstuna. Adventin, fyrireikingartíðin til jólini, er fýra vikur, men føstan er sjey vikur. Við góðari grund hava teir, sum hava lagt kirkjuárið til rættis, hildið, at vit skulu hava nógva tíð til grundiga fyrireiking til kirkjunnar størstu høgtíð. – Men føstutíðin verður ikki virðismett í okkara tíð. Hvussu mong hugsa djúpt um Jesu líðingarsøgu? Hvussu mong eru við til føstugudstænasturnar í kirkjuni.

Føstutíðin hjálpir okkum at hugsa um tað innara og djúpa í gleðiboðskapinum: Jesu líðing, deyða og uppreisn. Um føstan ikki merkir rættiliga nógv fyri okkum, er tað tekin um, at vit halda okkum í útjaðaranum og ikki hava sæð, at eitt lív í trúgv er ein ferð eftir krossins vegi.

Tað eru tveir vegir, tveir ymiskir mátar at meta um tingini. Tað, sum í hesum heimi verður rópt klókskapur, metir Guds orð sum dárskap. Í hesum heimi eitur tað: Vit halda okkum til tað, sum vit kunnu viga og máta og nema við. Vit halda okkum til veruleikan, til tað, sum vitið kann avprøva. Guds orð sigur, at vitugur er tann, sum roknar við einum yvirnatúrligum veruleika.

Føstutíðin setir okkum inn í avgerðina og leggur okkum eina við at meta rætt. Ríki Jesu Krists er ikki av hesum heimi. Tey, sum halda, at tey sjálvi makta lívið, yppa bara øksl yvir fyri honum, sum doyði á krossinum. Men tey, sum vita, at tey eru skuldarar, leita til hansara og biðja: ”Miskunna okkum! Tak okkum við upp í títt fylgi! Uttan teg eru vit einsamøll. Náða okkum og frels okkum!”

Vel, hvørjum tú vilt tæna! Ver vísur í, at metingin er røtt! Hugsa teg væl um, hvørji virðir tú heldur vera óumverilig! Nýt føstutíðina rætt! Lat hetta vera eina góða fyrireikingartíð!

*Aftur føstuklokkan ljóðar,*
*ljóðar tunt við sorgarlag;*
*føstusorg hon okkum bjóðar*
*inntil langa fríggjadag.*

*Kæri Jesus, hjálparmaður,*
*eg kann ei fulltakka tær,*
*ein og hvør má vera glaður,*
*páskagleði er so nær*

*Lat nú føstuklokku ringja,*
*ringja tungt við sorgarljóð;*
*enn í Himni einglar syngja:*
*„páskamorgun tú upp stóð.“*

# *Bjargaðir úr eldslogunum*

Ein kona vitnaði niðri á Blákross kaféini:

”Í 1977 var eg í Danmark, og eg kom aftur til Føroya við einum ferðamannaskipi. Veðrið var av tí allarbesta. Brádliga rópar skiparin gjøgnum hátalaran, at teir fara at broyta kósina eitt sindur, tí eitt skip er í neyð, eldur er komin í. Skipið var Ranafossur.

Úti í havsbrúnni sást nógvur roykur, og tá ið vit nærkaðust, sóust eldlogarnir toyggja seg móti himli. Menninir høvdu trunkað seg saman frammi í gron. Logarnir sleiktu upp eftir brúnni, og øll brúgvin stóð í ljósum loga. Alt í einum brotnaði brúgvin og sakk niður í logarnar.

Skiparin setti ein bjargingarbát út, og vit ferðafólkini sóu, hvussu ein maður fyri og annar eftir varð loraður niður í bátin. Tá ið teir vóru komnir upp á dekkið á ferðamannaskipinum, rópti skiparin: ”Eru nú allir her?”

Hatta rópið er ongantíð farið frá mær: ”Eru nú allir her?”

Hvussu er við okkum, rópa vit varskó til okkara medmenniskju? Um tey ikki eiga Jesus, so eru tey í líka stórum vanda, sum menninir umborð á Ranafossi. Bjargingin er Jesus. Vit mugu yvirgeva okkum til hansara við lív og sál. Hann hevur rindað fyri allar heimsins syndir. Bjóða honum inn í títt hjarta sum Harra og Frelsara. Legg tína lítlu hond í hansara stóru. So leiðir hann teg trygt heim í himmalin.

*Effie Campbell.*

# Gud gloymir ongan

Undir øðrum heimsbardaga róku nakrir sjómenn í einum bjargingarbáti í Atlantshavinum. Í nógvar dagar høvdu teir nú til fánýtis start út yvir havið eftir bjarging. Brádliga sigur hovmeistarin við ein av skipsfeløgunum: "Hvat er hatta, sum flýtur har undir bekkinum?" Ein av matrósunum tók eina lítla fjøl upp, á henni stóð: "Miskunn mín varir um ævir."

Tann dagin mátti hovmeistarin, sum hevði havt hesa fjølina hangandi á kamari sínum, sanna, at orðið talaði satt. Hvussu fjølin var komin við niður í bjargingarbátin, visti hann onki um, men hann visti, at Gud hevði talað til sín.

Hann kundi halda fram, sum tað stendur í sama sálmi hjá Dávidi: "Harrin er við mær, ikki eg óttist, hvat kunnu mær menniskju gera?"

Ja, soleiðis kann gangast, at Gud fær eina menniskju í talu á neyðardegi, men tað sama kanst tú eisini uppliva uppi á landi ein dapran vetrarmorgun. Guds miskunn røkkur eisini til tín. Hann vil taka sær av tær. Hann vil gera teg óttaleysan. Hann vil fylla hjarta títt við friði, ja, onki mark er fyri miskunn hansara. Latið okkum í dag leita inn undir miskunn Harrans og trúgva, at hon eisini røkkur til okkara.

*Tín miskunn, og Gud, er sum himinin há,*
*tín trúfesti røkkur til skýggja,*
*tín dýrd er um allan heimin at sjá,*
*tín kærleikssól lýsir til bíggja.*

*Sum fastbygda fjallið er rættvísi tín,*
*sum havdýpið ráð títt og dómar,*
*tú bønirnar hoyrir, ið leita til tín,*
*tín hátign og dýrd um os ljómar.*

---

Fyrr í tíðini ballaðu tey einki inn, tey søgdu tað hart og hvast. T.d. segði William Booth, stovnari Frelsunarhersins, sum gekk runt og hjálpti alkoholikarum: "Eg biði, at hvør einasti av offiserum mínum má vera í helviti í 10 minuttir, tí so sær hann, hvussu sær út inni har, og tískil vil hann restina av ævi síni boða Kristus og bjarga menniskjum frá hesum."

*e.c.* ums.

# Eg fylgist við pápa

Vilhjálmur var ein fittur og lívligur smádrongur. Eyguni bjørt og hárið purlut. Hann gekk í sunnudagsskúla og var bæði hugagóður og stillur.

Ein dagin spurdi lærarin hann: ”Vilhjálmur, hvønn gleðir tú teg mest til at hitt, tá ið tú kemur til himmals.”

Drongurin svaraði: ”Eg komi ikki til himmals!”

”Hvat sigur tú?” spurdi lærarin bilsin, tí hann var púra róligur og álvarsamur. ”Kemur tú ikki til himmals.”

”Nei, mamma og systir koma í himmalin, men ikki eg, tí eg fylgist við pápa.”

Stutt eftir hitti lærarin pápa Vilhjálm, sum var lækni. Hann tosaði um son hansara og segði, hvussu merkiliga sonur hansara hevði svarað í sunnudagsskúlanum.

Læknin, sum var fríteinkjari, gjørdist hugsanarsamur. ”Hatta líkist Vilhjálmi,” segði hann,”hann vil altíð sleppa at vera har, sum eg eri, og at fylgjast við mær.”

”Men kæri lækni, hvagar fara tygum?” segði lærarin álvarsamur.

Læknin tagdi og gekk eina løtu aftur og fram, og tað var eyðsæð, at hann var illa heitin, og at mangt mól í sinninum. Lærarin vildi ikki koma sær upp í hesa samrøðuna, sum læknin hevði við seg sjálvan – ímillum høvd og hjarta hansara. Lærarin segði honum farvæl og sá, at læknin stóð eftir og táraði.

O, pápi og mamma! Hvagar fara tit? Skulu hugmóð og gáloysni taka himmalsins sælu frá barni tykkara?

*t.* týddi.

---

Gud hevur eina skraddaraseymaða ætlan, sum bara passar tær. Leita eftir henni, finn hana og liv hana fult út.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 9. mars. | Tekstur: | Matt. 7,24-27; | bíbliuorð: | Matt. 7,24 |
| 16. mars. | Tekstur: | Luk. 15,4-7; | bíbliuorð: | Jóh. 10,11 |
| 23. mars. | Tekstur: | Matt. 22,1-14; | bíbliuorð: | Matt. 22,4 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




**Nr. 6** **23. mars 2014** **74. árg.**

# Vísdómurin

*Gevið tí væl gætur eftir, hvussu tit liva, ikki sum óvísir, men sum vísir, so at tit keypa hina lagaligu stundina, tí at dagarnir eru vondir.*

*Efes. 5,15-16.*

Hjá Prædikaranum lesa vit, at ongin maður ræður yvir deyðadegnum. Hesi orðini saman við orðunum úr Efesusbrævinum vísa okkum, at vit menniskju eru spent ímillum tíðina og ævinleikan. Prædikarin minnir okkum á, at deyðin er partur av korum okkara, og í Efesusbrævinum ger Paulus vart við, at lívið hevur eina æviga dimensión. Vit skulu liva í núinum, men ikki fyri núinum. Vit eiga ikki at stremba eftir njótingini í løtuni, men eftir tí fullkomna lívinum í ævinleikanum. Soleiðis livir nevniliga tann vísi, at hann ikki bara kennir Harrans vilja, men eisini - alt tað er møguligt - ger Harrans vilja.

Deyðin og okkara menniskjaligi veikleiki eru ein dupult avmarking. Vit kunnu ikki við egnari megi ella ágrýtni sleppa undan deyðanum, og vit klára heldur ikki at vinna okkum pláss í ævinleikanum. Tí hava vit bert eitt at gera, og tað er at seta álit okkara á uppreisn hins krossfesta Jesu Krists. Tá ið vit líta frameftir, síggja vit beinanvegin fram móti deyða og dómi. Men millum okkum og deyðan og dómin kemur Jesus okkum á møti. Hann kemur ímóti okkum úr landinum hinumegin deyða og grøv fyri at fylgja okkum tann seinasta teinin, sum vit enn hava eftir at ganga. Hann kemur ímóti okkum úr landinum hinumegin deyða og grøv, fyri at leiða okkum ígjøgnum deyðan til ævigt lív í ljósi og kærleika.

Hetta er vísdómurin, ikki at búgva seg til við egnari trúgv, viti ella gerningum, men heilt og fult at seta álit sítt á Guds kærleika við Jesusi Kristi Harra okkara. Í navni hansara kunnu vit fara deyðanum á møti við treysti og líta fram móti ævinleikanum við vón. Tað er í hesi trúgv og í hesari vón, at vit í øllum veikleika okkara kunnu gera tað, sum núið krevur av okkum. Tí at hansara er Ríkið og valdið og heiðurin í allar ævir. Amen.

*At trúgva er at hvíla*
*og líta á hans verk,*
*at deyða kunna smíla*
*í sorgum vera sterk.*

*At trúgva er at halda*
*í hendur Frelsarans*
*og lata andan valda*
*á leið til himnalands.*

# Vælsigna børnini

"... nakrar mammur bóru smá børn til Jesusar ..." Mark. 10,13. Bíblian sigur: "Og hann tók tey í favn og legði hendurnar á tey." Mark. 10,16. Áhugavert er tað, tí Jesus hevði beint frammanundan talað um hjúnaskilnað. Man tað vera so, at Bíblian greiðir okkum frá tí á henda hátt, av tí at knúst heim gera knúst børn?

Alt ov ofta verða børn fangað í einum stríði millum ill foreldur. Viðhvørt brúka vit tey sanniliga sum vápn móti hvør øðrum.

Hjúnaskilnaður eigur at vera okkara síðsti útvegur, ikki okkara fyrsti møguleiki. Vit vaksa í miskunnsemi, tá ið vit temja okkara sjálvgóðsku og seta okkara maka á fremsta plássið. Bíblian sigur, at hatta slagið av kærleika "... fellur
ongantíð burtur ..." 1. Kor. 13,8.

Jesus, sum var í ferð við at tala um trupulleikar hjá vaksnum, steðgaði síni skundmiklu skrá at vælsigna børnini. Hann gav teimum ikki góð ráð, hann nam bara við tey, av tí at kraft er í einari neming. Latið okkum vísa teimum virðing, sum arbeiða við børnum, tí tað er eitt týdningarmikið og tignarligt kall. Og latið okkum ikki gloyma at nema tey smáu lív við orðum fullum av vónum og einum lívgandi og eggjandi smíli.

Fyri nøkur verður okkara stuðlan kanska tann einasta, tey fáa. Ger teimum ikki mein, tí tey eru framtíðin.

Hvat bagir hesum lærusveinunum? Hvør hevði sagt teimum, at teir høvdu ov nógv at gera, so teir ikki kundu elska, vælsigna og taka sær av børnum?

Talar Gud til tín gjøgnum hesa andakt?

"... et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

# Eg gangi millum einglar

„ Eg dugi ikki at greiða frá, hvat tað var, sum hendi. Men tað er líka so vist sum, at vit nú tosa saman. Brádliga stóð ein eingil við mína koyggju.“

Tann ungi sjómaðurin hevði leingi stríðst við andaligar spurningar, og hevði longst eftir at fáa frið við Gud. Og har úti á stóra havinum kom ein eingil og segði við hann: ”Tú skalt ikki óttast longur, tí bønir tínar eru hoyrdar.” Og ein undurfullur friður kom yvir hann, og hann visti, at hann var eitt Guds barn.

Mong seta spurningin:” Kunnu vit trúgva, at einglar eru til?” Og vit kunnu svara: ”Hava vit orsøk at halda, at einglar ikki eru til?” Guds møguleikar til at koma á tal við menniskju eru mangir. Og hann velur altíð tann háttin, har hann best kann sannføra okkum og svara okkara loyniligu spurningum.

Í Bíbliuni verður greitt frá einglum, sum ganga ørindi fyri Gud fyri at fáa hvønn einstakan í talu, og ferð eftir ferð upplivdu fólk, at sagt varð við tey: ”Óttast ikki, bøn tín er hoyrd.”

Eisini vit kunnu uppliva hetta. Um vit síggja eingilin ella ikki, er ikki tað týdningarmesta, men tað avgerandi er, um vit hava oyru, sum kunnu hoyra røddina úr erva: ”Óttast  ikki, tú ert mín.”

# Tøkk fyri lánið

Jarðarferð hevði verið. Eftir jarðarferðina varð boðið í ervi, og nógv fólk tóku av. Mong vøkur orð vórðu søgd um konuna, ið farin var, hvussu hjartagóð og gávumild og gestablíð hon hevði verið; men tey vakrastu orðini vóru hesi:

Nakrar dagar áðrenn hon fór, kom ein grannkona at vitja hana. Grannkonan bar henni eitt blómutyssi við reyðum rósum. Rósurnar lógu eina løtu á dýnuni, og hin sjúka konan kíndi teimum eymliga; men brádliga tók hon rósurnar og trýsti tær at bringuni og segði:

”Allar heimsins reyðu rósur, tær muna lítið til lambsins krans!”

Av tí at øll tey, sum skuldu siga nøkur góð orð um ta farnu konuna, høvdu havt orðið, reistist maður hennara. Við veiku gamlamannarødd síni takkaði hann øllum, sum fylgt høvdu konu síni, tí tey høvdu gjørt henda dagin so hugnaligan og troystarríkan. Soleiðis vildu kona hansara og hann hava dagin at vera. Og so endaði hann við hesum orðum:

”Og so skal eg takka tær, Gud, fyri at tú læntu mær Onnu.”

*t.* týddi.

# Fyrigev – fyri tína egnu skuld

So leingi, sum tú kemur saman við fólki í samfelagnum, samkomuni og á arbeiðsplássinum, verður tú vónsvikin og ørkymlaður, og ikki minst verður tú villleiddur, og tey royna at stýra tær.

Men tá ið tú savnar teg um Guds orð, sum sigur fyrigev og gloym og gakk eina eyka míl við fólki, tá gongur tú í kærleika og fyrigeving. "Kærleikin tolir alt, trýr øllum, vónar alt, ber alt." 1. Kor. 13,7. Tá ið vit ganga í agape kærleikanum, verður alt hatur og allur beiskleiki viskaður burtur. Tað er tað bera tvætl at hava nakað ímóti nøkrum, sjálvt um tað er grundarlag fyri tí. Jesus hevur borið okkara misgerðir og misgerðir hjá øðrum á krossinum, so tí boyggja vit okkum fyri Orðinum, sum sigur: Vælsigna tann, sum forfylgir tykkum. Fyrigev og liv í fyrigevingini. Líð heldur órætt, tí tú fert altíð at hava tína rættvísi í Kristusi.

Summi siga: "Eg kann ikki fyrigeva. Eg havi rætt at hata og vera ímóti tí persóni, sum hevur gjørt mær so nógv ónt." Tað, sum tú mást skilja, er, at tú gert tær sjálvum eina bjarnartænastu, tá ið tú ikki fyrigevur. Tú heldur teg bundnan til eina ávísa hending og ein ávísan persón. Øll orka tømist út úr tær, og tú ert rætt og slætt fangaður í satans garni.

Ver villigur at brúka tín vilja at fyrigeva. Tá forloysir tú Guds kraft bæði inn í støðuna og inn í títt lív. Tað fyrsta, tú merkir, er, at gleðin og friðurin koma aftur. Orkan veksur fyri hvønn dag, tú frøir teg í Harranum. Aftur skalt tú sanna, at gleðin í Harranum er styrki tín. Tað er harmiligt, at kristin ikki lesa dagliga í Orðinum. Uttan Guds orð fær hin einstaki nógvar óneyðugar líðingar. Kæri vinur, vit ynskja at síggja teg fyltan við gleði, friði og Guds kraft, frískan og sunnan og virkisfúsan.

Minst til, at keldan til eitt sigrandi lív liggur í Guds orði. Tak Bíbliuna í álvara. 1 Jóh. 5,4-5 sigur: "Tí at alt, sum er føtt av Gudi, vinnur sigur á heiminum; og hetta er tann sigur, sum hevur vunnið á heiminum, trúgv okkara. Hvør er tann, sum vinnur sigur á heiminum, uttan tann, sum trýr, at Jesus er Guds sonur." Orðið sigrar altíð har, sum tað sleppur til.

Jan Hanvold
*Effie Campbell* umsetti.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 23. mars. | Tekstur: | Matt. 22,1-14; | bíbliuorð: | Matt. 22,4 |
| 30. mars. | Tekstur: | Luk. 15,11-32 | bíbliuorð: | Jóh. 6,37b |
| 6. apríl. | Tekstur: | Matt. 18,21-35 | bíbliuorð: | Matt. 6,12 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74